# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein spurningur um mannarættindi

Málið um broytingina av revsilógini, greinina um forboð móti mismuni og háðan, so hendan grein eisini kemur at fevna um kynsligan samleika er um at spjaða tjóðina. Útheimurin hevur nú sett fokus á hetta mál og tingmenn noyðast tí at hugsa seg væl um. Hvørjar verða fylgjurnar, um teir fella málið og hvørjar verða fylgjurnar um teir taka undir við broytingaruppskotinum. Í vikuskiftisblaðnum vóru hesar fylgjur gjølla lýstar.

Hvat hendir, um vit ikki fremja broytingina nú? So standa vit fyri útheiminum sum ein tjóð, ið loyvir happing av fólki orsakað av teirra kynsliga samleika. Føroyar hava, sum víst varð í grein her í blaðnum fríggjadagin, samtykt ST sáttmálan um mannarættindi. Hetta kann bert merkja, at Løgtingið er mestsum skyldugt at samtykkja broytingaruppskotið.

Ein onnur síða av málinum er okkara altjóða umdømi og tær politisku fylgjur, ið kunnu standast av, at málið fellur. Í síðstu viku var mestsum rok í Norðurlandaráðnum av hesum máli, sum nú orsakað av eini undirskriftsherferð er komið í altjóða fokus. Undir spurnarorðaskifti í Norðurlandaráðnum gjørdu norðurlendskir tingmenn vart við, at støðan í Føroyum hóttir okkara limaskap í ráðnum. Tað líkist ongum at hótta eina brøðratjóð á hendan hátt, og tann ræðumynd, sum nú verður teknað av Føroyum í donsku pressuni, tænir ongum endamáli.

Hinvegin er hetta ein sera álvarsom støða, ið nú hevur tikið seg upp. Tingmenn eiga at hava hesi viðurskifti í huga, tá ið teir atkvøða í morgin. Tingmenn skulu ikki stinga upp fyri hóttum. Men hinvegin hava teir skyldu at tryggja, at vit halda altjóða avtalur og grundleggjandi mannarættindi. Her sleppst tí ikki uttanum at samtykkja uppskotið, um vit skulu halda ST samtyktina um mannarættindi, sum tingmenn sjálvir áður hava samtykt.

**Sosialurin**

## Seinasta rentuhækkingin fór í lumman hjá Janusi

**– Aftursvar til forstjóran í Føroya Banka**

Tíðum verður sagt, at tøl kunnu tulkast, so tey siga tað, tú ynskir. Og tað er eftir øllum at døma hetta, ið Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, roynir í lesarabrævi í bløðunum hósdagin 2. november, samstundis sum hann enn einaferð roynir at sáa iva um trúvirði hjá útvarpinum og sendingini ”62 Norður.” Royndin kann illa tulkast sum annað enn ”spinn,” har endamálið er at flyta fokus frá tí, ið málið snýr seg um.

Í sendingini 27. november royndi Janus Petersen at sáa iva um faktuel og almen tøl, ið Landsbankin hevur savnað saman. Tølini vísa rentuna hjá danska tjóðbankanum og lægstu útlánsrentu hjá føroysku peningastovnunum, frá 1994 til í dag. Munurin hevur onkuntíð verið rættuliga stórur, eitt nú skuldu føroyskir sethúsaeigarar í 1996 rinda heili trý prosent meira í rentu enn danski tjóðbankin setti sum sína útlánsrentu. Síðani aldarskiftið hevur munurin verið millum 1,75 prosent og 2,25 prosent. Hetta eru sum nevnt almenn og faktuel tøl.

Í fjør vetur hendi ein broyting í føroyska fíggingarheiminum. Kappingin herdist, og tað ávirkaði rentuna, ið fall munandi. Ella sagt við øðrum orðum: føroyingar fingu bíligari lán.

Síðani metlágu rentuna í desember í fjør, tá bíligasta útlánsrentan hjá føroysku peningastovnunum var 1,2 prosent hægri enn rentan hjá tjóðbankanum, er rentan hækkað fýra ferðir. Hvørja ferð hevur grundgevingin hjá peningastovnunum verið, at tjóðbankin hevur hækkað rentuna. Rentan hjá tjóðbankanum var í desember í fjør 2,25 prosent, í dag er hon 3,25 prosent. Í desember í fjør var lægsta bústaðarrentan hjá føroysku peningastovnunum 3,45 prosent, í dag er hon 4,75 prosent. Tað merkir, at síðsta árið hevur tjóðbankin hækkað rentuna eitt prosent, meðan føroysku peningastovnarnir hava hækkað rentuna 1,3 prosent.

Spurningurin til Janus Petersen í sendingini var tí, hví neyðugt er hjá Føroya Banka at hækka rentuna meira enn tjóðbankin ger? Seinasta rentuhækking hjá bankanum, sum kom í gildi 12. oktober var júst 0,3 prosent. Kundi bankastjórin kanska spart sethúsaeigarum hesa rentuhækking?

Tað er beinleiðis ósakligt og óseriøst, tá bankastjórin vísir á, at fyrr var munurin millum rentuna hjá tjóðbankanum og hjá føroysku peningastovnunum størri enn hann er í dag. Hvør skal siga: fyrr smurdu vit tjúkkri smør á breyðið enn vit gera í dag.

Útvarpið hevur á ongan hátt skift meining og hevur ei heldur avnoktað niðurstøðurnar, sum komu fram í sendingini ”62 Norður,” eins og Janus Petersen spinnur í sínum lesarabrævi. Nevndu tøl eru øll faktuel og almenn. Hvat niðurstøðuni í kanningini hjá Landsbankanum viðvíkur, so verður har staðfest, at rentan er lægri í dag, enn hon hevur verið onkuntíð áður. Men eftir stendur tó, at rentan er hækkað fýra ferðir síðani í desember, og at Føroya Banki í hesum tíðarskeiði hevur hækkað sína rentu 0,3 prosent meira enn danski tjóðbankin. Tað vil siga at hesir pengar tískil eru endaðir í lummanum hjá Janusi Petersen og Føroya Banka, sjálvt um tjóðbankin segðist vera orsøk til rentuhækkingina.

Umrødda samrøða við Janus Petersen er at finna á internetinum, heimasíðan er www.uf.fo/62n, vel síðani teigin til vinstru, ið nevnist ”lurta á netinum.”

***Dánjal Højgaard & Jón Brian Hvidtfeldt,***
*journalistar*
***Jóhann Mortensen,***
*tíðindaleiðari*

## Boykott móti Føroyum hjálpir einki

**DETLEF WILDRAUT**
føroyavinur
í Týsklandi

Eg var sera bilsin, tá ið eg las í greinini ”Boykott av føroyskum vørum kann gerast veruleiki” nakað um kjakforum okkara ”Das Forum für Freunde der Färöer in Deutschland” (Sosialurin, nr. 208 -- 27.oktober 2006, s.6).

Ja, tað er satt. Ein limur í kjakforumi okkara skrivaði, nú hann hevði frætt, hvussu samkynt fólk í Føroyum vórðu álopin, helt hann, at hann mundi ikki ætlað sær aftur til Føroya. Men hann var tann einasti í forumi okkara, sum bar fram soleiðis.

Eg eri harmur um, at nøkur fólk úttanlands ákæra Føroya fólk, sum um allir føroyingar niðurseta tey samkynt og nokta teimum rættindini, ið eitt og hvørt menniskja átti at eiga, uttan mun til, um tað er samkynt ella ikki samkynt.

Tí eri eg sera glaður um, at nógvar føroyingar mótmæla teimum landsmonnum, ið nokta teimum samkyndum rættin at liva teirra lív, soleiðis sum tey vilja liva tað, hóast tey ikki særa onnur fólk við at gera tað. Til dømis vil eg nevna her tær átta føroysku kvinnur og áheitan teirra.

Eg eri ilskur um áheitanirnar til boykott ímóti Føroyum og í forumi okkara havi eg avgjørt borið fram ímóti boykotti, tí eg haldi, at eitt boykott ger ongan mun. Haldi eisini, at vit hjálpa ikki føroyingunum, ið stuðla rættindini hjá teimum samkyndum, um vit heita á til boykott, men tvørturímóti, soleiðis leypa vit á teimum aftanífrá.

Nú vóni eg, at meirilutin í Føroya Løgtingi hesaferð gongur undan við góðum dømi og samtykkir broytingaruppskotið, so at tað sæst týðliga, at samkynt fólk í Føroyum eins og í øðrum londum í Europa kunnu liva teirra lív við ongum ótta. Hetta er jú tað einasta, alt kjak snýr seg um í roynd og veru.

Men – um Løgtingið eisini hesaferð noktar at samtykkja, hvat so skal eg svara teimum, ið ákæra Føroyar og krevja boykott???


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.